# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Løgmansrøðan - nýtt og gamalt

Í gjár varð nomið við tað, sum í løgmansrøðuni verður sagt um fiskivinnuna, at vit standa við vegamót við stórum avbjóðingum, har tann størsta er at broyta bygnaðin í fiskivinnuni. Vit vístu á, at ein kanska gjørdi í so nógv av við at samanbera komandi broytingarnar í fiskivinnulógavuni við Trúbótina, men annars stuðlaðu vit landsstýrinum í ætlanum tess við nýggja fiskivinnupolitikkinum. Her er lítið í at velja, so er bert eftir at vóna, at vit og skil vinna á sjálvsøkni og stuttskygni.

Løgmaður kemur víða um í røðu síni og røðan er óvanliga breið og principiel. Stórur dentur verður lagdur á hugtøk sum broytingar, altjóða samstarv og sjálvbjargni, eins og dustið verður turkað av Visjón 2015. Tað eru fingramerkini hjá samstarvsflokkum løgmans, ið viga tyngst í hesi røðu. Sjálvbjargni er, sigur røðan, aðalmál hjá einum og hvørjum samfelag, fólki og tjóð. Málið er miðvíst at fáa ein sjálvberandi búskap, soleiðis at vit gerast fíggjarliga óheft og skapa einar sjálvbjargnar Føroyar. Her kunnu ivaleyst flestir føroyingar taka undir við løgmanni, hóast ein skuldi hildið, at sjálvberandi búskapur er amboðið og ikki málið fyri einum sjálvbjargnum samfelag. Sjálvbjargnið skal vinnast við at hildið verður fram við yvirtøkunum og hetta er heilt eftir samgonguskjalinum.
Hinvegin kundi verið áhugavert at fingið at vita, hvussu løgmaður hugsar sær, at yvirtøkurnar, ella blokkniðurskurðurin, skal fíggjast. Hetta er kanska ein villutrúar- ella kettarskur spurningur í siðaskiftishøpi, men ætlaninar eru so mangar, stórar og dýrar, at almenningurin hevur krav uppá eitt svar. Vit fáa eina hóming av einum svari undir umrøðuni av skattamálum, har løgmaður varisliga fyrireikar miðal- og hátinntøkurnar til skattahækkingar.

Vælferðarmál rúma nógv í røðuni. Her síggja vit fingramerki Javnaðarfloksins. Hinvegin er lítið beinleiðis nýtt á hesum øki, mestsum framhald av politikkinum hjá undafarnu samgongu. Sama er at siga um útbúgving og gransking, ið er staðfesting av gamla politikkinum. Mentanin fær føgur orð. Høvuðsdenturin verður lagdur á mentanararvin, meðan listin og listafólkini verða als ikki nevnd. Hetta kann verða fingramerki Miðfloksins. Mentanararvur, søvn og mál eru jú góður og konservativur mentanarpolitikkur, meðan listin kann vera eitt sindur vandafull, setur spurnartekin, skakar og avdúkar politiskt hykl og gykl. Listin er als ikki nevnd í hesi løgmansrøðu. Tað nærmasta vit koma listini er, at røðan er kryddað við Williamsitatinum um sandskornið á dansigólvinum. Ikki eitt orð um tjóðleikhús ella listaháskúla, einki um mentanargrunnin, einki um starvslønir og einki um tónlistagrunn ella um filmsgrunn. Hesi mál, list og listafólksins kor, høvdu annars sera stórt pláss í valstríðnum – nú eru tey burturtagd. Men list og listafólk hava heldur ongantíð verið populer í siðaskiftistíðum, so tað er kanska ikki so løgið.

**Sosialurin**

## Burðadygg fiskiveiða



**HEÐIN DÁNIALSSON POULSEN**

landsnevndarlimur Sjálvstýrisfloksins

"At tryggja burðardygga og skynsama fiskiveiðu" Hetta var eitt av málunum, ið Sjálvstýrisflokkurin fór uppá val við, og er hetta staðfest í sáttmálanum, ið vit valevnir hjá Sjálvstýrisflokkinum skrivaði undir og sendu í hvørt hús í Føroyum undan síðsta løgtingsvali.

Sjálvt um henda samgongan hevur sett sær nógv mál fyri, harav fleiri mál, ið Sjálvstýrisflokkurin kann taka undir við, hevur samgongan siglt tungan sjógv frá byrjan. Tað er harmiligt at síggja, hvussu ein maður kann halda eina heila politiska skipan sum gísla, bert tí hann einans hevur skil fyri einum holið. Kanska hevði tað besta verið, um restin av løgtinginum valdi at venda hesum einfoldiga persóni bakið og heldur settið fokus á øll tey umráðandi málini, ið skulu loysast. Tí uttan mun til, um hann fekk knappar 600 atkvøður, so fingu hinir 32 løgtingslimirnir nógvar ferðir fleiri.

Landsstýrismaðurin í Tilfeingismálum hevur nú lagt fram uppskot um, hvussu fiskivinnan skal skipast. Uppskotið leggur upp til stórar tillagingar í fiskivinnuni og hevur landsstýrið heitt á andstøðuna um at samstarva við samgonguna. Inniber uppskotið hjá landsstýrismanninum "at tryggja burðardygga og skynsama fiskiveiðu", so eiga tinglimirnar hjá Sjálvstýrisflokkinum at taka áheitanini frá landsstýrinum til sín og taka undir við uppskotinum.

Ikki av tilvild hava hinir andstøðuflokkarnar valt gamla stílin og eru longu farnir í skotgravirnar at skjóta eftir samgonguni og øllum teirra virksemi. Sjálvstýrisflokkurin hevur slóðað fyri og víst á, at til ber at samstarva yvir samgongumark. Tað eigur ikki at vera ein spurningur um, hvør situr í landsstýrinum, men at skynsamar avgerðir verða tiknar til frama fyri Føroya land og fólk.

Tískil vænti eg, at nú Løgtingið skal taka støðu til fiskidagar og, hvussu framtíðar fiskivinnan skal skipast, at tinglimirnir hjá Sjálvstýrisflokkinum fara at fylgja tí sáttmála, ið eisini teir hava undirskrivað "at tryggja burðardygga og skynsama fiskiveiðu".







Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.